# ítróttur

Nr. 246 • Leygardagur • 21. desember 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tvey heiðursskjøl latin

**Á samkomu í ÍSF-húsinum mikudagin fingu Kaj Aage Troest og Børge Barcley Hansen handað heiðursskjal Peoul E. Petersens**

VIÐURKENNING
*Jákup Mørk*

Tað er um at vera fastur siður, at ÍSF á hvørjum ári heiðrar onkrum persónum, sum onkursvegna hava útint eitt megnararbeiði innan føroyskan ítrótt.

Árið í ár var einki undantak í so máta, og mikukvøldið var so lítil samkoma í ÍSF-húsinum, har tvey heiðursskjøl vórðu latin.

Hesa ferð vóru tað teir báðir, Børge B. Hansen og Kaj Aage Troest, sum fingu viðurkenningina, og einki er at ivast í, at teir báðir hava verið drúgvir innan ítróttina.



*Børge B. Hansen fekk heiðursskjalið fyri 25 ára nevndararbeiði innan føroyskan fótbólt*

### Drúgvur nevndarlimur

Børge fekk sítt heiðursskjal fyri drúgva nevndararbeiði sítt í FSF, har hann seinastu 25 árini hevur verið fastur fúsur. Í løtuni er hann næstformaður í nevndini, men harumframt hevur hann í drúgt áramál verið formaður í fíggjarnevndini, umframt at hann eisini hevur verið formaður fyri kappingarnevndini okkurt árið.

Hesi árini hava nógv, stór og tung frambrot verið gjørd føroyskum fótbólti at frama, og í grundgevingini fyri handanina varð millum annað nevnt graslíkisvøllir, FIFA-limaskapin og ikki minst støðuga landsliðsarbeiðið, sum FSF hevur staðið fyri.

### Eigur fimleikin í Runavík

Kaj Aage Troest fekk sína virðisløn fyri drúgva virksemi sítt innan fimleikin.

Nú skal omanfyristandandi ikki skiljast so, at eingin fimleikur hevði verið í Runavík uttan Kaj Aaga, men í øllum førum hevur hann verið ein hollur stuðul har á leiðini.

Eftir at hann blaðungur hevði vunnið fleiri einstaklingakappingar hjá Havnar Fimleikafelag flutti hann í seksti-árunum til Runavíkar, og har var hann skjótt við til at stovna fim-leikafelagið Støkk. Felagið hevur verið virkið síðani, og í fleiri enn 20 ár var tað við Kaj Aage sum leiðara. Í dag er hann kanska ikki heilt so sjónligur í nevndararbeiðinum, men hann er mangan við, tá tøk skulu takast. Ikki bara fyri Støkk, men eisini fyri føroyskan fimleik sum heild.



*Kaj Aage Troest fekk heiðursskjal Poul E. Petersens fyri drúgva arbeiði sítt innan fimleik á bæði lokalum og landsdekkandi støði*

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 10 | 8 | - | 0 | - | 2 | 246 | 205 | 41 | 16 |
| 2 | VÍF | 11 | 7 | - | 0 | - | 4 | 248 | 201 | 47 | 14 |
| 3 | Stjørnan | 10 | 5 | - | 1 | - | 4 | 215 | 219 | -4 | 11 |
| 4 | StÍF | 10 | 5 | - | 1 | - | 4 | 237 | 243 | -6 | 11 |
| 5 | Neistin | 11 | 4 | - | 2 | - | 5 | 219 | 231 | -12 | 10 |
| 6 | Kyndil | 10 | 4 | - | 0 | - | 6 | 236 | 242 | -6 | 8 |
| 7 | Tjaldur | 10 | 1 | - | 0 | - | 9 | 191 | 251 | -60 | 2 |

**1. Deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 12 | 8 | - | 1 | - | 3 | 379 | 299 | 80 | 17 |
| 2 | StÍF | 11 | 8 | - | 0 | - | 3 | 317 | 277 | 40 | 16 |
| 3 | Neistin | 11 | 8 | - | 0 | - | 3 | 308 | 290 | 18 | 16 |
| 4 | Kyndil | 11 | 5 | - | 2 | - | 4 | 298 | 289 | 9 | 12 |
| 5 | KÍF | 11 | 4 | - | 1 | - | 6 | 286 | 295 | -9 | 9 |
| 6 | H71 | 11 | 2 | - | 0 | - | 9 | 265 | 321 | -56 | 4 |
| 7 | Tjaldur | 11 | 2 | - | 0 | - | 9 | 262 | 344 | -82 | 4 |

**Flogbóltsstøður – Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 10 | 8 | - | 2 | 26 | 9 | 17 | 16 |
| 2 | ÍF | 10 | 8 | - | 2 | 28 | 12 | 16 | 16 |
| 3 | Mjølnir | 10 | 7 | - | 3 | 25 | 12 | 13 | 14 |
| 4 | Dráttur | 10 | 5 | - | 5 | 18 | 23 | -5 | 10 |
| 5 | KÍF | 10 | 1 | - | 9 | 7 | 27 | -20 | 2 |
| 6 | Fleyr | 10 | 1 | - | 9 | 6 | 27 | -21 | 2 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 8 | 8 | - | 0 | 24 | 2 | 22 | 16 |
| 2 | Mjølnir | 8 | 5 | - | 3 | 15 | 12 | 3 | 10 |
| 3 | Fram | 8 | 4 | - | 4 | 16 | 13 | 3 | 8 |
| 4 | SÍ | 8 | 3 | - | 5 | 8 | 18 | -10 | 6 |
| 5 | Fleyr | 8 | 0 | - | 8 | 0 | 24 | -24 | 0 |

## Dystir um vikuskiftið

Hondbóltur
1. deild kvinnur
21.12 14.30 Neistin-Stjørnan
21.12 14.30 Tjaldur-VB
21.12 14.30 StÍF-Kyndil

1. deild menn
21.12 16.00 Neistin-KÍF
21.12 16.00 Tjaldur-H71
21.12 16.00 StÍF-Kyndil

Flogbóltur
Meistaradeild kvinnur
21.12 13.00 ÍF-TB
21.12 13.00 KÍF-Mjølnir
22.12 14.00 Dráttur-Fleyr

Meistaradeild menn
21.12 15.00 Fleyr-SÍ
21.12 15.00 Fram-Mjølnir



# Oddurin verður avgjørdur

**StÍF og Neistin kunnu við sigri í dag fara fram um VÍF, men tey verða kortini ikki fremst, tá farið verður undir endaspælið, og í Runavík verður botnuppgerð millum Tjaldur og H71**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Er lagið á StÍF og Kyndli hitt rætta, eru fá – um nøkur – lið í landinum, sum kunnu geva áskoðarunum eins undirhaldandi hondbólt*

Sjáldan hevur tað verið somikið javnt sum í ár, tá helmingurin av hondbóltslandskappingini er runnin. Um so er, at Neistin og StÍF vinna sínar dystir leygardagin, verða trý lið púrasta jøvn í stigum, tá farið verður undir endaspælið, og undir ongum umstøðum verður munurin millum tey trý fremsti meira enn eitt stig.

### Verður ivaleyst tætt

Tí er tað kanska ikki tann heilt stóra vanlukkan, um Neistin ella StÍF skuldu sett stig til í dag. Eitt stig er so altíð møguligt at vinna aftur. Men hinvegin er kappingin sera, sera jøvn í ár, og tí er einki at ivast í, at mest sum hvørt stig í endaspælinum verður avgerandi.

Á pappírinum er tað kanska StÍF, sum hevur torføraru uppgávuna, tá teir á heimavølli taka ímóti Kyndli. StÍF var í útidystinum móti Kyndli fyri eitt av trimum tapum higartil, og yvir høvur er tað væl eisini so, at júst Kyndil man vera eitt hitt truplasta liðið hjá StÍF at spæla ímóti. Hetta tí teimum eins og strandingum dámar væl at spæla kvikan hondbólt, har bólturin ger arbeiðið, heldur enn at stórir skjúttar taka sær av øllum, og tí talar alt fyri einum spennandi dysti. Og ivaleyst kann talan eisini gerast um ein av meira undirhaldandi dystinum, tí hava hesi liðini ein góðan dag, eru helst eingi onnur, sum kunnu skapa ein eins áskoðaravinarligan hondbóltsdyst.

Hóast hon kanska ikki er eins trupul á pappírinum, so er tað á ongan hátt nøkur løtt upgáva, sum Neistin hevur um vikuskifti. Kollfirðingar hava fleiri ferðir gjørt ein vørr móti ovaru liðunum í vetur, og við einum sigri her kunnu teir syrgja fyri, at teir í øllum førum koma heilt nær oddinum undan endaspælinum. Og so skulu teir bláu nokk eisini minnast til, at tað eru ikki meira enn tríggir dagar síðani teir vóru fyri eyðmýkjandi tapi fyri næstbestu kollfirðingunum. Her verður tað altso besta liðið, sum Neistin skal royna seg ímóti, og so er spurningurin, hvørt teir reisa seg somikið, at ein hevnd er vantandi.

### Botnuppgerð í Runavík

Seinasti dysturin verður í Runavík, har H71 vitjar hjá Tjaldri. Soleiðis sum kappingarárið hevur lagað seg higartil, so tykist hetta longu nú at gerast ein týdningarleysur dystur. Ikki minst tí talan ikki er um nakran niðurflytingarvanda.

Men hinvegin er einki at ivast í, at báðir partar helst vilja sleppa undan at skula halda til á aftasta sessinum. Kanska serliga hoyvíkingar hava seinastu umførini víst ein vilja til at sleppa úr hesi støðuni, meðan Tjaldur hinvegin hevur gjørt ein vørr av og á ígjøgnum árið, og tí kann væl verða, at talan verður um ein dyst av teimum heilt frægu í Runavík.

# Nú skal oddurin markast

**VB skal enn einaferð royna at staðfesta oddasessin, og í hinum báðum dystunum kappast fýra lið um rættin at fylgja oddinum**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Enn er grundspælið hjá kvinnunum ikki liðugt, og tað verður tað heldur ikki um vikuskiftið, men fyri tað er spenningurin longu nú í hæddini. Sum úrslitini hava lagað seg í ár, so tykist einki at skula verða avgjørt fyrr enn seinasta leikumfar, og í løtuni kappast seks av teimum sjey liðunum um at vinna sær so gott útgangsstøði sum gjørligt til endaspælið.

Sjeynda liðið - og á pappírinum tað klárt veikasta – er Tjaldur. Hóast tær fleiri ferðir hava verið hampuliga nær við, so hevur tað bert verið ta einu ferðina, at tað hevur bragdað, og tí er avgerandi neyðugt, at tær vinna sær stig nú, um tær ikki skulu verða dømdar til niðurflyting, longu áðrenn endaspælið byrjar.

Mótstøðan hesa ferð kundi tó neyvan verið harðari. Kanska hevur VB ikki verið so sannførandi seinastu umførini, sum tær annars hava verið, men tær eru framvegis oddalið, og einki er at ivast í, at tær ætla sær at staðfestsa hetta leygardagin. Seinasti dysturin hjá VB er í Vestmanna, og fáa tær ikki fulla úrtøku hesaferð, er ilt at ímynda sær, hvussu tær tá kunnu halda fast um oddasessin til endaspælið.

### Kyndil uttan Lotte

Í Havn verður dystur millum Neistan og Stjørnuna, og á Skála verða tað StÍF og Kyndil, sum fara at takast. Í báðum førum er talan um dystir millum lið, sum fyri alt í verðini skulu hava tvey stig, soleiðis at tey kunnu liggja so nær oddinum sum gjørligt, tá grundspælið er av.

At gera nakran part til favoritt í hesum uppgerðum er ivaleyst sera trupult. Neistin tykist seinastu vikurnar at hava fingið so toluligt glið á spælið, sum annars hevur verið heldur stirvið, og kunnu tær halda fast um tað, so áttu tær at havt góðan møguleika móti Stjørnuni. Hinvegin gjørdi Stjørnan bart móti VB, nú Danijela Ercevic var aftur á liðnum, og tí eigur enn ein sigur móti Neistanum so avgjørt ikki at útilokast.

Á Skála eigur StÍF helst at metast sum favorittur. Heilt einfalt av teirri orsøk, at Lotte Sørensen ikki er á Kyndils-liðnum hesaferð. Hon er farin til Danmarkar at halda jól, og so má Kyndil so klára seg uttan vanliga spælskiparan. Hóast hetta, so hevur tað hinvegin fleiri ferðir víst seg, at tá lið mangla teir mest týðandi leikararnir, mennast hini á liðnum, so hóast hetta á pappírinum er eitt viknað Kyndils-lið, so eigur StÍF ikki at kenna seg trygt.

# Restorff's Jólabridge

**Hesa ferð er talan ikki um flótandi løg, men harafturímóti um bridge-kapping, sum verður í HB-húsinum 2. jóladag**

BRIDGE
*Jákup Mørk*

Sum nakað nýtt hevur bridgehúsið í Havn sett sær fyri at skipa fyri eini jólakapping í væl umtókta kortspælinum.

Hetta veðrur ein sokallað parakapping, sum ætlandi skal verða eitt afturvendandi tiltak, tó sjálvandi treytað av undirtøkuni hesaferð.

Hesum seinasta tykjast fyrireikararnir tó ikki at bera nakran serligan ótta fyri, sum skilst. Hóast talan sjálvsagt er um hugnaløtur við familju, vinum og kenningum, so kunnu jólini í mangar mátar tykajst nakað drúgv til tíðir, og tí er ivaleyst eitt sindur frískligt, soleiðis at taka lut í eini bridgekapping annan dag, tá alt jólastákið kortini er mest sum liðugt.

Kappingin, sum byrjar klokkan 14.00, verður skipað soleiðis, at talan í alt verður um eini 30 spøl, har tað síðani verður talt saman fyri at finna vinnandi parið.

Og hóast onkur einsamallur bridge-spælari skuldi sitið heima, so skal hesin ikki halda seg aftur. Tað er nevnliga eingin treyt, at tilmeldingarnar skulu vera í pørum, og ert tú støk ella stakur, so er bara at siga til, so verður ein makkari funnin, verður sagt.

# Silvurdystur í Havn

**Tveir dystir verða í Havn um vikuskifti, og meðan SÍ líkist stórfavoritti móti Fleyr, líkist dysturin millum fram og Mjølnir eitt slag av silvurdysti**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tveir dystir hjá monnunum um vikuskiftið, og verða teir báðir leiktir í Havn.

Mest spennandi tykist dysturin millum Fram og Mjølnir at vera, tá hetta eru liðini, sum eru ávíkavist nummar tvey og trý á stigatalvuni,. Mett eftir avrikunum farna vikuskifti er tó einki at ivast í, at Fram er greiður favorittur. Á Kambsdali var tað um reppið, at teir koppaðu ÍF, og tá Mjølnir mikukvøldið púrasta óvæntað mátti lúta fyri SÍ á heimavølli er spurningurin kanska, hvussu hesi avrikini kunnu ávírka sjálvsálitið hjá leikarunum.

Hin dysturin er millum Fleyr og SÍ, og hetta líkist í nógvar mátar einum avgreiðsluspurningi fyri SÍ. Enn hevur Fleyr so ikki tikið nakað sett í nøkrum dysti, og nú sørvingar veruliga hava tikið dik á seg, tykist tað ikki, sum um tað skal verða her, at Fleyr fær fyrsta settið.